ítróttur

Nr. 2 • leygardagur • 4. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Grundspælið skal avgerast

Seinastu dystirnir hjá kvinnunum undan endaspælinum verða um vikuskiftið, og tó at oddasessurin er avgreiddur, so er stórur spenningur um øll úrslitini

KVINNUHONDBÓLTUR
Jákup Mørk

VÍF skal á heimavølli royna at minka munin til VB niður í eitt stig. Vinnur VB hinvegin, eru tær í hvussu so er tvey og kanska trý stig undan næsta liðnum

Hóast menninir í løtuni halda frí í landskappingini, nú landsdystir eru á skránni, so merkir hetta ikki, at hondbóltsáhugaðir føroyingar mugu vera dystir fyriuttan um vikuskiftið.

Í bestu kvinnudeildini verður nevnliga framvegis spælt við fullari ferð, og nú eru tað seinastu dystirnir í grundspælinum, sum standa á skránni.

Her hevur VB longu tryggjað sær, at tað verða tær, sum eru fremstar, tá farið verður undir endaspælið, men fyri tað er so langt ífrá allur spenningur fokin.

Eitt skifti sá annars út til, at VB var einasta liðið við nóg góðum stoðufesti til framhaldandi at toga stigagevandi avrik fram, men men seinnu vikurnar er stígur komin í hjá teimum. Samstundis hevur VÍF ment seg, soleiðis at tær so smátt aftur eru farnar at líkjast liðnum, sum hevur hølvað alla mótstøðu av tey bæði seinnu árini, og júst hesi bæði liðini hittast í Vestmanna um vikuskiftið.

Her kann VÍF við einum sigri syrgja fyri, at munurin upp til oddin verður tann minst møguligi, tá farast skal undir endaspælið, og einki er at ivast í, at tað er hetta, sum farið verður eftir. Hartil skal eisini havast í huga, at tað var júst VB, sum í seinasta dystinum í fjør breyt tvey ára longu sigursrøðina hjá VÍF, og tað er uttan iva nakað, sum vestmannakvinnurnar vilja hevna.

Hinvegin er tað ikki av tilvild, at VB er fremsta liðið á stigatalvuni. Liðið hevur fram um hini megnað at hildið støðið í avrikum sínum, og við trimum framúrskarandi útlendskum leikarum á liðnum, skal VÍF veruliga spenna seg út, skulu tær minkað um munin til oddin, nú endaspæli stendur fyri framman.

Spenningur um næstu sessirnar

Eftir at teir báðir oddafiskarnir hava avgreitt tann spurningin leygardagin, verða tveir aðrir dystir leiktir sunnudagin. Og eisini her hava dystirnir stóran týdning fyri, hvussu útgangsstøðið verður hjá ymsu liðunum í endaspælinum.

Á Skála spæla StÍF og Stjørnan, og tað verður vinnarin av hesi uppgerðini, sum sleppur at byrja á bronsuplássinum. Hjá Stjørnuni er enntá somikið stutt upp til oddin, at tær við einum sigri kunnu vinna seg upp á annað plássið í kappingini, og í minsta lagi byrja tær á sama stigatali sum VÍF – um tær altso vinna sín dyst.

Hinvegin nýtist StÍF heldur ikki at hyggja so øgiliga langt uppeftir, um tær vinna sín dyst. Tær hava í løtuni 11 stig, og sostatt møguleikan at koma ájavnt Stjørnuni á triðja plássinum. Og tað er sjálvandi ein møguleiki, sum tær ynskja at taka av.

Skulu nøkur verulig vónbrot finnast í kappingini higartil í ár, so skulu hesi helst finnast í Havnini. Neistin hevur øll hondbóltsárini verið við til at seta sín dám á bestu kvinnukappingina, men seinnu árini hava tær tó ongan tíð verið mentar at vinna seg heilt fram í oddin. Somikið illa fyri, sum tær hava verið í ár, hava tær tó neyvan verið, og nú eru útlit fyri, at tær byrja endaspælið sum næst aftasta av teimum sjey lið-unum.

Hitt vónbrotið í ár, Kyndil, hevur møguleika at gerast leyst av Neistanum, fáa tær tvey stig við sær aftur úr Runavík, og tað er tað nógv, sum bendir á, at tær fara at gera. Ikki minst, tí einastu stigini, sum Tjaldur hevur fingið higartil, komu í útidystinum ímóti Kyndli, og einki er ivast í, at hetta er ein blettur, sum Kyndil nú vil royna at vaska av sær aftur. Hinvegin sýndi sigurin í Havn, at Tjaldur á einum góðum degi væl kann gera nakað við hini liðini, og so er spurningurin bara, hvussu dagurin hjá liðunum báðum fer at hilnast hesaferð.

1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VB	11	9	-	0	-	2	278	225	53	18
2 VÍF	11	7	-	0	-	4	248	201	47	14
3 Stjørnan	11	6	-	1	-	4	238	239	-1	13
4 StÍF	11	5	-	1	-	5	261	271	-10	11
5 Kyndil	11	5	-	0	-	6	264	266	-2	10
6 Neistin	12	4	-	2	-	6	239	254	-15	10
7 Tjaldur	11	1	-	0	-	10	211	283	-72	2

Finnland-Føroya 28-20 (12-10):

Mistu í tíggju minuttir

Ein svørt løta miðskeiðis í seinna hálvleiki misprýddi føroyska avrikið í Finnlandi, men hóast alt mundi føroyska ferðalagið vera so hampuliga væl nøgt um úrtøkuna

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Føroyska manslandsliðið tapti greitt í fyrra dystinum móti Finnlandi, men avrikið var í stórum þørtum av dystinum sera gott, og føroysku venjararnirtykjast hava grundaða vón um eitt gott úrslit, tá Finnland kemur á vitjan sunnudagin

Føroyska landsliðið varr fyri greiðum tapi í fyrsta EM-undankappingardystinum á hesum sinni. Dysturin varð leiktur í Finnlandi, og sum tað framgongur omanfyri, so gjørdist talan um ein átta mál stóran sigur til finnlendingar.

Vóru væl við

Tá vit eftir dystin fingu orðið á føroyska hjálparvenjaran, Hjalmar Klein Olsen, mátti hann sjálvandi ásanna, at Føroyar høvdu tapt fyri einum betri liði, men tað skerst ikki burtur, at hann iðraði seg um, at tapið gjørdist so óneyðuga stórt.

– Allan fyrra hálvleik standa vit okkum sera væl, og vit hava alla tíðina samband við teir. Tað sama er galdandi í seinna hálvleiki, men í einar tíggju minuttir missa vit takið, soleiðis at teir veruliga fáa skrykt seg leysar.

Og øtlini fyri dystin boða eisini frá, at nakað er um hetta. Tá góðir 10 minuttir vóru leiktir av seinna hálvleiki, var støðan 17-15 til heimaliðið, men næstu løtuna skræddu teir seg leysar, soleiðis at munurin øktist upp í 24-17, og so var lítið at gera hjá okkara monnum.

Breiddin restaði

Í Útvarpinum hóskvøldið segði Lars Nedergaard, at enn er breiddin í føroyska hópinum nakað lítil, og at tað partvíst var hetta, sum kostaði stóra munin, og Hjalmar er heldur ikki heilt ósamdur í hesum.

– Tað var í øllum førum soleiðis, at vit hesa løtuna fremja hópin av óneyðugum mistøkum, og hetta kann vera tekin um møði, ella at teir leikarar, sum koma inn, ikki koma nóg væl inn í dystin.

– Tað er tó ikki so, at eg skal seta fingurin á nakran leikara, tí eg haldi avgjørt, at talan var um eitt sera gott liðavrik. Serstakliga í fyrra hálvleiki stóðu vit okkum framúr í verjupartinum, har flata verjan fekk fatar á nógvum. Í álopspartinum kundu vit kanska ynskt okkum nøkur fleiri temposkift, men hinvegin spældu vit sera umhugsi við longum álopum, so tað kunnu vit ikki veruliga finnast at.

Spurdur, um tað er nakar einstakur leikari, sum hann hevur hug at rósa, er Hjalmar nakað ivasamur, men nevnir so kortini afturvenda Tróndi Joensen.

– Sjálvandi telir tað uppeftir, at hann skjýtur seks mál, men eisini í verjupartinum royndist hann sera væl, og tað er so avgjørt nakað, sum fegnast um, men sum sagt, so eg talan fyrst og fremst var um eitt liðavrik.

– Tað einasta, sum kanska var eitt sindur keðiligt, var, at vit ikki í nóg stóran mun dugdu at gera okkum dælt av yvirtalsstøðunum, sum ískomu. Sjálvir fingu vit fleiri útvísingar, tí finnlendingunum dámdi væl at spæla tætt inn at verjuni, og her vórðu vit oftast revsaðir. Hinvegin fingu teir eisini fleiri útvísingar, og tað megnaðu vit ikki at revsa tilsvarandi hart, heldru hjálparvenjarin.

Kann gerast spennandi

So sum skilst, so var tað helst við nakað blandaðum kenslum, at landsliðshópurin sessaðist í flogfarinum aftur fríggjamorgunin. Longu sunnudagin er landsdystur aftur á skránni, tá Føroyar eiga heimavøll móti Finnlandi. Og hóast greiða tapið, so tykjast vónirnar ikki heilt ongar undan teirri uppgerðini.

– Nú veit eg sjálvandi ikki, um teir hava fleiri aðrar streingir at spæla uppá, ella um teir kanska kunnu seta ferðina longur upp, enn teir gjørdu í dag.

– Men spæla finnlendingarnir á sama hátt, sum teir gjørdu í dag, samstundis sum vit fáa lyft okkara spæl tey seinastu prosentini, so ivist eg ikki í, at vit fáa ein spennandi dyst. Ikki minst um vit eisini fáa áskoðarnar við okkum, soleiðis at vit veruliga kenna fyrimunin av heimavøllinum.

– Eg skal ikki siga, at vit áttu at vunnið dystin í dag, men eini 3-4 mál á muni hevði verið meira hóskandi, tí vit spældu veruliga upp til teir størsta partin av dystinum, sigur Hjalmar Klein Olsen at enda.

Sum nevnt, so verður seinni dysturin móti Finnlandi leiktur sunnudagin, og verður hetta í høllini í Hálsi í Havn kl. 16.00. Til tann dystin vóna landsliðsvenjararnir, at John Zachariasen verður tøkur. Hann mátti sita eftir hesa ferð við einum eymum lærkrika.

Føroysku málskjúttarnir hósdagin vóru annars hesir: Tróndur Joensen 6, Heini Joensen 6, Áki Olsen 2, Bárður Brimvík 2, Sveinur Justinussen 1, Mortan Hansen 1, Martin Hummeland 1, Hans Áki Dal-Christiansen 1.

Finalistarnir skulu finnast

Tað er longu greitt, at TB-kvinnurnar og menninir hjá SÍ skulu spæla í steypafinaluni, og um vikuskiftið skulu mótstøðuliðið teirra finnast

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Hetta hendir í Klaksvík, har Mjølnir-kappingin er á skránni um vikuskiftið. Fyrru finalistarnir vórðu funnir heilt tíðliga á kappingarárinum, tá Fleyr hevði sína kapping, og so er spurningurin, hvørji mótstøðuliðini verða.

Hjá monnunum tykist tað í øllum førum soleiðis, at ÍF er eitt upplagt boð til finalusessin. Teir hava vunnið allar landskappingardystirnar, og tað er bert Fram, sum hevur megnað at tikið sett frá oddaliðnum. Hinvegin er her talan um steypakapping, og tí er ikki óhugsandi, at eisini fuglfirðingarnir fara at fáa tað torført. Tað man í øllum førum vera púrasta víst, at hini liðini í deildini síggja hetta sum einasta møguleikan at knógva teimum, og tí skulu fuglfirðingarnir veruliga vera upp á sítt besta, um teir skulu tryggja sær ein revanchu-dyst móti SÍ, sum jú vann steypafinaluna í fjør.

Hjá kvinnunum tykist ÍF eisini vera eitt gott boð til ein finalusess, nú tær eru á odda í landskappingini. Heilt so einaráðandi sum menninir hava tær tó ikki verið, og fyrst og fremst verða tað helst Mjølnir og TB, sum fara at geva teimum kapping, umframt at Dráttur kanska eisini kann gera onkran vørr.

Hvussu er og ikki, so verður alt hetta svarað í KÍ-høllini um vikuskiftið.

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur kvinnur

04.05	16.00	VÍF-VB
05.05	14.30	Tjaldur-Kyndil
05.05	14.30	StÍF-Stjørnan

Menn

05.05	16.00	Føroyar-Finnland

Flogbóltur
kvinnur & menn
Mjølnir kapping